Av Viðareiði og á Svangaskarð

INTERTOTO CUP
Jóannes Hansen

NSÍ skal seinnapartin í dag spæla í Intertoto ímóti Esbjerg. NSÍ hevur heimavøll á Svangaskarði. Mikukvøldið vann NSÍ 2-0 á heimavølli ímóti Skála. NSÍ tóktist ikki serliga darvað av, at tað síðstu tíðina hevur verið stutt millum dystirnar hjá teimum.

Ian Højgaard noyddist av vøllinum, tí hann var skaddur. Tað er rættuliga ivasamt, um hann verður fórur fyri at spæla í dag. Hann skoraði málið, tá ið NSÍ síðsta leygardag tapti 3-1 í Esbjerg.

Esbjerg hevur í hesi vikuni verið í Norðoyggjum. Teir halda til millum stóru fjøllini á Viðareiði, hagar teir komu mikukvøldið aftaná, at teir høvdu tapt 2-0 í Klaksvík. Hósdagin vandu teir tvær ferðir í Klaksvík, og í gjár vandu teir á Svangaskarði.

Ímóti KÍ vóru ikki allir profilarnir á liðnum hjá Esbjerg. Ivaleyst fara teir í dag at spæla við besta liðnum. Í dansku fjølmiðlunum hevur verið roknað við, at NSÍ bara skal vera avgreiðslusøk hjá Esbjerg.

Brasilumaðurin framvegis í bíðistøðu

B36 sær møguleikar fyri at nærkast toppinum, um teir fáa fult mánakvøldið, tá ið teir skulu spæla á Svangaskarði

B68-B36
Jóannes Hansen

Fram til meistaraárið 1997 megnaði B36 ongantíð at fáa fult á Svangaskarði. Síðani hava teir vunnið hvørja ferð. Undantakið var í fjør, tá ið teir tíðliga á árinum vóru í aldudali og taptu 1-0. B68 hevði ongan málmøguleika, men við sjálvmáli syrgdi B36 fyri, at stigini vóru eftir á Toftum!

Hesa ferð er Pól Thorsteinsson, sum var málskjútti í fjør, skaddur. Annars stendur tað væl til við fólki hjá B36. Eftir trilvandi byrjan vunnu teir sunnudagin trivaligan sigur á heimavølli ímóti ÍF. Um Jóannes Jakobsen fær fult á Toftum, har hann áður hevur verið venjari, og um tað lagar seg væl á annan hátt, so rokna teir í B36 við, at tað skal bera teimum til at lyfta seg uppaftur nærri toppinum.

Á Toftum hevur nógv verið tosað um brasiliumannin Andersson, sum teir vóna skal skjóta málini, ið higartil ikki eru komin. Hann hevur verið í hálva aðru viku á Toftum. Tað hevur verið bíðað eftir formellu loyvunum. Á middegi í gjár vóru tey ikki komin, men teir vónaðu, at hetta fór at koma upp á pláss, áðrenn teir mánakvøldið skulu spæla ímóti B36.

Annars stendur ikki væl til við fólki á Toftum. Øssur Jacobsen er burturstaddur. Bogi Petersen og Mortan Hansen hava ikki vant í vikuni, tí teir framvegis hava verið skaðaplágaðir.

Arnbjørn Danielsen skal saman við liðfeløgum sínum í B36 inn á Toftir at vitja sínar bygdarmenn í B68, sum enn eiga sín fyrsta sigur til góðar.

Mikkjal Thomassen lá sjúkur fyrrapartin av vikuni, og Herbert í Lon Jacobsen var burturstaddur. Hann vandi fyrstu ferð hóskvøldið.

HB og NSÍ mikukvøldið

HB-NSÍ
Jóannes Hansen

Síðsti dysturin í nýggjunda umfarinum er toppuppgerðin millum HB og NSÍ í Gundadali. Í dag fer NSÍ at spæla í Intertoto á Svangaskarði. Tí er dysturin ímóti HB í skipanini lagdur til næsta mikukvøld.

HB er saman við Skála á odda í bestu deildini, og NSÍ er á triðja plássinum.

At dystirnir eru so spaddir í einum leikumfari er rættuliga óforoyskt. Men soleiðis er tað ofta í eitt nú Íslandi og Svøríki. Í dag verður spælt í Vági og á Skála, í morgin verður spælt í Fuglafirði, mánakvøldið verður spælt á Toftum, og so skulu HB og NSÍ spæla mikukvøldið.

Mannfall hjá báðum pørtum

ÍF-KÍ
Jóannes Hansen

ÍF fær í morgin vitjan av KÍ. Hjá báðum pørtum hevur tað leingi verið svangligt. KÍ hevur ikki fingið fult síðani teir í fyrsta umfarinum flaggdagin vunnu 1-0 á B68, og ÍF hevur ikki fingið fult, síðani teir í 2. umfari vunnu 4-2 á NSÍ.

Felags fyri báðar partar er eisini, at leikligu avrikini hava ikki verið nakað at reypa av, og at tað hevur verið mett, at evnini hava verið til betri fótbóltsspæl enn tey, sum hava verið at sæð.

KÍ hevur verið omaná nógvu tær síðstu ferðirnar liðini hava spælt í Fuglafirði í landskappingini. Síðsti heimasigurin hjá ÍF var í 1993, tá ið teir vunnu 2-1. Fyrr í vár megnaði ÍF á heimavølli í fjórðingsfinaluni at senda KÍ úr steypakappingini.

Hjá ÍF stendur ikki væl til við fólki. Bartal Eliasen er við flogbóltslandsliðnum í Luksemborg, og Magni á Lakjuni er so mikið skaddur, at hann ikki hevur vant. Í gjár varð ikki roknað við, at hann verður fórur fyri at spæla í morgin. Bæði Áki Petersen og Árni Petersen hava í vikuni verið plágaðir av fótliðsskaða.

Hjá KÍ er Eyðun Klakstein, sum hevur verið ein tann stinnasti, síðani hann endiliga fekk kjansin, leikbannaður. Jan Joensen er í Danmark í brúdleypi hjá Toda Jónsson, og tað er Fríðin Ziskason, sum hevur verið innskiftari, eisini. Tá ið KÍ mikukvøldið vann 2-0 á Esbjerg, vóru Erling Fles og unglingaspælarin Julian Samuelsen í álopinum, meðan Jacob Bymar og Leon Bjartalið vóru á miðvøllinum saman við Atla Danieslen og Símuni Joensen. Jákup Hansen og Frank Joensen, sum skoraði seinna málið, vóru eisini á vøllinum eina løtu.

Skála spælir í dag

EB/Streymur ætlar ikki lítið, nú teir í morgin fara til Italia á venjingarlegu í fjúrtan dagar

SKÁLA-EB/STRREYMUR
Jóannes Hansen

Í dag er rættuliga týdningarmikil uppgáva á skránni hjá skálamonnum. Teir fáa møguleikan at reisa seg eftir fyrsta tapið í hesum kappingarárinum. EB/Streymur vitjar á Skála. Sambært skipanini skuldi dysturin verið spældur í morgin. Hann er fluttur til í dag klokkan 14, tí EB/Streymur í morgin fer til Italia á venjingarlegu.

Skála spældi ikki væl mikukvøldið ímóti NSÍ. Teir megnaðu ikki at spæla seg til ein tann einasta málmøguleika. Tað er greitt, at liðformaðurin Pauli G. Hansen og málverjin, Igor Bjarni Kostic, ikki vera við. Teir eru báðir skaddir. Harafturímóti verður Alexandur Johansen við aftur. Hann var sjúkur mikudagin og er komin fyri seg aftur. Heini Kristiansen, sum stóð seg væl, tá ið hann loysti av í málinum, verður millum stólparnar.

Skála og EB/Streymur hava tvær ferðir áður spælt landskappingardyst á Skála, har heimaliðið báðu ferðirnar hevur fingið fult.

EB/Streymur slapp væl burturúr heimadystinum ímóti B68. Í vánaligum líkindum fingu teir í evstu løtu heppið mál til 2-1. Undan ferðini til Skála eru allir spælararnir tøkur uttan Pazek. Hann vandi fyrstu ferð hóskvøldið og er ikki enn fórur fyri at spæla.

EB/Streymur fer næstu tvær vikurnar at venja á ítróttarmiðstøð nærindis Ancona í Norðuritalia. Seytjan spælarar eru í ferðalagnum, sum tilsaman er uppá umleið 25 fólk.

Alexandur Johansen hjá Skála var ikki við í ósigrinum í Runavík mikukvøldið, men skálamenn vóna, at hann verður við móti sundalagsmonnum

Dystir um vikuskiftið

1. deild menn

Dagf.	*Dystur*	*Dómari*
26.06	VB-GÍ	Dagfinn Olsen
27.06	ÍF-KÍ	Eiler Rasmussen
27.06	Skála-EB/S	Oddmar Andreasen
28.06	B68-B36	Páll Augustinussen
30.06	HB-NSÍ	Petur Skarðenni

2. deild menn

26.06	LÍF-KÍ	Rúni Gaardbo
26.06	AB-FSV	Hans F. Hansen
26.06	Royn-Sumba	Suni Johansen
26.06	VB-TB	Petur H. Joensen
26.06	B71-B36	Palli Gregersen

3. deild menn

27.06	HB-NSÍ	Finnur Andreasen
27.06	TB-GÍ	Poul Poulsen
27.06	ÍF-SÍ	Johnleif Gerðisá
27.06	Skála-EB/S	Jan á Liðarenda
27.06	B68-Fram	Jákup M. Kjeld

EM-kappingin

Dagf.	*Kl.*	*Dystur*
26.06	19.45	Frakland-Grikkaland
27.06	19.45	Svøríki-Holland
28.06	19.45	Kekkia-Danmark

Allir rógva sama teinin

Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu tað verður mett at fara at ávirka, at tað nú bara verður róð á styttsta teininum, men framvegis er tað soleiðis, at í fleiri kappingum eru greiðir favorittar

FM KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen

Seinnapartin í dag er fjórði FM kappróðurin á skránni. Kappast verður á Jóansøku í Vági. Hesa ferð hava 60 manningar bjóðað seg fram at taka lut. Millum tær fimm, sum eru komnar afturat, eru tríggjar manningar úr Vági - 6-mannafarið Smyril við kvinnum og monnum, og so er tað 8-mannafarið Tofta Regin.

Sammett við tríggjar tær fyrstu FM kappingarnar verður róðrarteinurin hesa ferð øðrvísi. Stóra grótkastið á sunnara landinum á Vágsfirði er orsøk til, at tað har suðuri nógvu tær seinastu ferðirnar bara hevur verið kappast á styttsta teininum.

Tað er í trimum kappingum, at teinurin hesa ferð verður styttri, enn hann higartil hevur verið. 6-mannaførini við monnum og 8-mannaførini hava kappast á 1500 metrum, og 10-mannaførini hava kappast á 2000 metrum tvær tær seinastu ferðirnar. Í Klaksvík róðu tey 1500 metrar.

Tvær manningar hava vunnið allar kappingarnar. Tað eru 6-mannafarið Jarnbardur við kvinnum og 8-mannafarið Argjabáturin. Eingin ivi er um, at hesar báðar manningarnar eru stórir favorittar at vinna í dag.

Á Skálafjørðinum og í Hvalvík vann Blikur við gentum og dreingjum. Sigrarnir vóru sannførandi, tá ið hugsað verður um, hvussu tøtt kappingin plagar at vera í dreingjaróðrinum og genturóðrinum. Argjamanningarnar mugu finna seg í at vera favorittar á Jóansøku.

Jarnbardur hevur vunnið kappingina millum 6-mannafør við monnum tvær tær seinastu ferðirnar. Hann er mest upplagdi kandidaturin at vinna í Vági. Men endaspurturin síðsta leygardag boðaði frá, at Sundabáturin, sum vann á Norðoyastevnu, ikki uttan víðari fer at lata sær lynda, at Jarnbardur fer at vinna. Spurningurin er so, hvussu stórt árin á kappingina tað fer at hava, at teinurin hesa ferð verður 1000 og ikki 1500 metrar.

Nólsoyingur boygdi leygardagin Havnarbátinum, sum vann bæði í Klaksvík og á Skálafjørðinum. At 10-mannaførini hesa ferð skulu kappast á hálva teininum letur sjálvandi upp fyri øllum møguleikum. Hóast tað ikki hevur hilnast so væl hjá teimum, so hava ábendingar verið um, at bæði Vestmenningur og Eysturoyingur kunnu gera um seg. Hoyvíkingur stóð seg betri á Hvalvík, enn hann hevði gjørt frammanundan, og teir umborð á Vágbingi eru sjálvandi ógvuliga uppsettir at gera alt fyri at vinna á Vágsfirði og harvið lyfta lagnum á Jóansøkuni.

Á kappróðrarprátinum skilst, at hugsanirnar eru ymiskar um, hvussu tað kann ávirka, at teinurin er nógv styttri. Summir siga, at talan er um heilt øðrvísi uppgávu og avbjóðing. Aðrir siga, at hjá teimum verður tað ikki so nógv øðrvísi.

So er tað spurningurum um veðrið og umstøðurnar annars. Tað er eysturætt, og hann hevur boðað frá eitt sindur av vindi. Fyrrapartin í gjár var veðrið gott, men kortini varð í kappróðrarumhvørvum tosað um at fara suður í gjárkvøldið. Tað ræður um at vera væl fyri, tá ið startskotini fara at gella á Vágsfirði í dag.

Fimmmannafør, dreingir
1 Svanur
2 Tjaldrið
3 Sílið
4 Drekin
5 Fípan Fagra
6 Havfrúgvin
7 Blikur
8 Tekla
9 Firvaldur
10 Spógvin
11 Kollur
12 Royndin Fríða
13 Báran

Seksmannafør, kvinnur
1 Smyril
2 Sølmundur
3 Gongurólvur
4 Páll Fangi
5 Jarnbardur
6 Lómur
7 Víkingur
8 Sundabáturin

Fimmmannafør, gentur
1 Hvassi
2 Spógvin
3 Ørnin
4 Tjaldrið
5 Fípan Fagra
6 Sílið
7 Firvaldur
8 Blikur
9 Havfrúgvin
10 Frúgvin
11 Junkarin
12 Drekin
13 Tekla
14 Falkur
15 Dúgvan

Seksmannafør, menn
1 Hvessingur
2 Sandingur
3 Sølmundur
4 Lómur
5 Sundabáturin
6 Jarnbardur
7 Gongurólvur
8 Strálan
9 Víkingur
10 Hósvíkingur
11 Smyril

Áttamannafør
1 Miðvingur
2 Nevið Reyða
3 Kvívíkingur
4 Argjabáturin
5 Ørvur
6 Knørrur
7 Tofta Regin

Tíggjumannafør
1 Vestmenningur
2 Vágbingur
3 Havnarbáturin
4 Nólsoyingurin
5 Hoyvíkingur
6 Eysturoyingur

1. deild menn

	d	v	j	t	mál	mál	+/-	stig
1 Skála	8	5	2	1	18	7	11	17
2 HB	8	5	2	1	21	9	12	17
3 NSÍ	8	4	3	1	14	10	4	15
4 VB	8	3	4	1	11	6	5	13
5 B36	8	3	3	2	17	12	5	12
6 EB/Streymur	8	3	2	3	14	11	3	11
7 KÍ	8	1	6	1	9	10	-1	9
8 GÍ	8	2	2	4	9	17	-8	8
9 ÍF	8	1	1	6	12	26	-14	4
10 B68	8	0	1	7	6	23	-17	1

2. deild menn

	d	v	j	t	mál	mál	+/-	stig
1 TB	8	6	0	2	25	11	14	18
2 AB	8	5	2	1	15	9	6	17
3 Royn	8	5	0	3	22	18	4	15
4 FSV	8	4	2	2	30	16	14	14
5 B71	8	4	1	3	21	22	-1	13
6 Sumba	8	3	2	3	12	13	-1	11
7 KÍ	8	2	2	4	17	21	-4	8
8 B36	8	2	2	4	10	18	-8	8
9 LÍF	8	1	2	5	10	23	-13	5
10 VB	8	0	3	5	7	18	-11	3

Vitus farin til hús

Í Vági hevur hilnast so mikið væl hjá vertunum fyri Jóansøkuni, at møguleiki er fyri, at VB skal halda summarfrí á heiðursmerkjaplássi

VB-GÍ
Jóannes Hansen

VB er á aldukambinum, og GÍ er í aldudalinum. Spurningurin er so, hvussu tað fer at síggjast aftur, tá ið hesi bæði liðini í kvøld fara at spæla á Vágseiði.

Nógvu tey seinastu árini hevur GÍ staðið seg væl í Vági. Skulu teir tað hesa ferð, so verður neyðugt at teir skjóta mál. Tað hevur verið sera soltið hjá gøtumonnum við málskjótingini. Í vár leigaðu teir Vitus Kofoed úr FCK. Vónin var, at hann skuldi skjóta málini. Tað megnaði hann ikki, og nú er stóri álopsmaðurin farin av aftur landinum. Atli Gregersen var leikbannaður ímóti HB, og hann er eisini leikbannaður ímóti VB.

Vágbingar liggja fram ímóti heiðursmerkjaplássunum. Lagar tað seg væl hjá teimum, so hava teir møguleika fyri at halda summarfrí ikki so langt frá toppinum. Í Klaksvík var Dan Djurhuus leikbannaður. Hann er tøkur aftur, men nú er Mortan úr Hørg leikbannaður. Dalius hevur ikki vant orsaka av sjúku, og Mindaugas noyddist av vøllinum í Klaksvík, tí hann var skaddur. Í Klaksvík var Símun Samuelsen ikki við, tí hann var skaddur. Tað verður roknað við, at hann verður tøkur ímóti sínum gomlu liðfeløgum í Gøtu.

Í Klaksvík vóru tveir ungir vágbingar fyrstu ferð á besta liðnum. Teir vóru Hans Allan Niclasen og Hartmann Hansen.

Palli Augustinussen og VB fara at royna at halda fram við góðu úrslitunum higartil í kappingarárinum, tá ið GÍ kemur á vitjan í Vági

Skála hevur tølini við sær

Oddaliðið av Skála hevur hesa ferð hagtølini í sínum parti. Tvær ferðir hevur EB/Streymur vitjað á Skála í fyrstudeildardysti, og báðu ferðirnar hevur Skála vunnið. So er spurningurin, um hetta eisini verður støðan um vikuskiftið, tá Skála skal royna at halda um oddasessin, heldur enn at berjast fyri lívinum.

Annars er merkisvert, at GÍ ofta hevur staðið seg sera væl í Vági, har VB bert tvær ferðir hevur vunnið hesi seinastu tíggju árini. Á Fuglafirði hevur KÍ als ikki tapt í langa tíð, og sjálvt um B68 vann á B36 í fjør, so eru samlaðu hagtølini í parti við eldra árstalsfelagnum.

Í Gundadali verður so ikki leikt fyrr enn mikudagin. Her hevur NSÍ ofta argað HB, men samanlagt eru tað tó vertirnir, sum hava tølini í sínum parti.

So er spurningurin, hvussu alt hetta fer at laga seg sunnudagin. Hagtølini í sjálvum sær avgera so einki, men til stuttleikar hava vit her sett upp, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini hetta umfarið hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju kappingarárini.

-jm